Lagt til rættis: Eydna Skaale

# 13-7

## Nýggi próvtalastigin í fólkaskúlaum

*Nýggi próvtalastigin, sum hevur verið ávegis í fleiri ár, verður í summar settur partvís í gildi. Tað vil siga, at bert fólkaskúlarnir fáa nýggja próvtalsstigan, sum gongur frá 12 til minus 3.*

*Miðnámsskúlarinir mugu bíða enn eitt ár. Lidnir miðnámsskúlanæmingar mugu sostatt framvegis umrokna próvtalið, tá tey søkja inn á hægri lærustovnar.*

**Umrokning av einstøku próvtølunum frá 13-stiganum til 7-stigan**

| 13 stigin | 7 stigin |
|---|---|
| 13 | 12 |
| 11 | 12 |
| 10 | 10 |
| 9 | 7 |
| 8 | 7 |
| 7 | 4 |
| 6 | 02 |
| 05 | 00 |
| 03 | 00 |
| 00 | -3 |

**Umroking av miðaltalinum frá 13-stiganum til 7-stigan**

| 13 stigin | 7 stigin |
|---|---|
| 6,0 | 2,00 |
| 6,1 | 2,2 |
| 6,2 | 2,4 |
| 6,3 | 2,6 |
| 6,4 | 2,8 |
| 6,5 | 3,0 |
| 6,6 | 3,2 |
| 6,7 | 3,4 |
| 6,8 | 3,6 |
| 6,9 | 3,7 |
| 7,0 | 3,9 |
| 7,1 | 4,1 |
| 7,2 | 4,3 |
| 7,3 | 4,5 |
| 7,4 | 4,7 |
| 7,5 | 4,9 |
| 7,6 | 5,1 |
| 7,7 | 5,3 |
| 7,8 | 5,5 |
| 7,9 | 5,8 |
| 8,0 | 6,0 |
| 8,1 | 6,2 |
| 8,2 | 6,2 |
| 8,2 | 6,4 |
| 8,3 | 6,6 |
| 8,4 | 6,8 |
| 8,5 | 7,1 |
| 8,6 | 7,3 |
| 8,7 | 7,5 |
| 8,8 | 7,7 |
| 8,9 | 8,0 |
| 9,0 | 8,2 |
| 9,1 | 8,4 |
| 9,2 | 8,6 |
| 9,3 | 8,8 |
| 9,4 | 9,0 |
| 9,5 | 9,2 |
| 9,6 | 9,4 |
| 9,7 | 9,6 |
| 9,8 | 9,8 |
| 9,9 | 10,0 |
| 10,0 | 10,2 |
| 10,1 | 10,4 |
| 10,2 | 10,5 |
| 10,3 | 10,7 |
| 10,4 | 10,8 |
| 10,5 | 11,0 |
| 10,6 | 11,2 |
| 10,7 | 11,4 |
| 10,8 | 11,6 |
| 10,9 | 11,8 |
| 11,0 og hægri | 12,0 |

# Marknagil 2014



Í løtni verða forkanningar gjørdar av lendinum við Marknagil, har skúladepilin skal byggjast. Somuleiðis er ein veðurstøð sett upp, ið ger mátingar av vindviðurskiftunum í økinum

Sjálvt projekteringsarbeiðið av skúladeplinum við Marknagil er komið væl áleiðis og verður liðugt umleið 10. juni. Síðani verður øll verkætlanin boðin út til arbeiðstakarar.

Samlaði fíggjarkarmurin fyri skúladepilin er 391 mió. krónur, har av projekteringsuppgávan er mett at kosta 37 mió. krónur. Sjálvt byggiarbeiðið fer í gongd í heyst, og eftir ætlan skal Skúladepilin við Marknagil verða klárur at taka í nýtslu á sumri 2014.

# 150 útbúgvin fólk rýma árliga

Føroyingar liggja í topp viðvíkjandi ungdómum, ið leita sær uttanlands at lesa. Heili 1100 føroysk ungfólk eru í løtuni uttanlands í lestrarørindum. Helvtin av teimum koma ikki aftur. Umroknað svarar tað til, at 150 vælútbúgvin føroysk ungfólk árliga veittra Føroyum farvæl.

***Tað vísir seg, at tað eru trý ting, ið serliga hava ávirkan á, at ungfólk ikki koma heimaftur eftir loknan lestur.***

- Jú yngri tey eru, tá tey fara
- Jú longri burtur tey fara
- Jú hægri útbúgving tey taka.




# Undirvísing á You-Tube

Tekniski skúlin í Havn gongur nýggjar leiðir. Tey eru farin at leggja undirvísingartilfar út á you-tube, soleiðis at næmingar og foreldur kunnu fáa gleði av tí. Undirtøkan er sera stór, og fólk kunnu tilmeldað seg, soleiðis, at tey fáa mail hvørjaferð okkurt nýtt verður lagt út. T.d. er eitt klipp, sum greiðir frá hvussu tú setur ð. Eitt annað greiður frá, hvussu tú nýtir eina krossskipan.